# porno fyri øll

Nú kjak hevur verið um bæði skrásett parlag og um Televarpið, sum fer at senda rásir, ið hava pornofilmar á skránni, hevur <ph_1> sett sær fyri at kanna, hvat tey ungu halda. Vit hava spurt umleið 150 ung í aldrinum 14 til 16 ár nakrar spurningar hesum viðvíkjandi.

Út frá svarunum kann staðfestast, at ein greiður meiriluti av teimum ungu eru ímóti skrásettum parlagi, men samstundis siga tey seg ikki hava nakað serligt ímóti samkyndum. Umleið helmingurin av teimum spurdu siga, at tað má hvør einstakur um, um hann ella hon er samkyndur.

Úti við 80 prosent siga, at tey hava sæð pornofilmar, tað veri seg á video ella á einari av rásunum, sum síggjast á parabol.

Áhugavert er at nevna, at ein greiður meiriluti av dreingjunum siga, at teir halda tað vera skeivt at sløkkja eina rás, meðan pornofilmur er á skránni, meðan líka so greiður meiriluti av gentunum siga, at tað er rætt.

Kanningin vísir somuleiðis, at tað eru ikki mong ung, sum sita og hyggja eftir pornografiskum tilfari á internetinum.

Spurd um tey nakrantíð hava havt kynsligt samband, svarar áleið ein triðingur av teimum spurdu, at tað hava tey.
























# ein tíðarmynd av føroyskum tónleiki




Nú er ein nýggj tónleikaárbók komin á føroyska marknaðin. Ein spildurnýggj bók – øll í litum – við tilfari um tónleikalívið í brátt farna ári. Fyrsta bókin av hesum slagnum kom út í fjør. So nú verður aftur lagt í vaðið.

– Tað eydnaðist so væl í fjør, at vit valdu at royna aftur í ár, sigur Eyðun Klakstein, sum hevur redigerað bókina.

– Ætlanin er, at bókin skal koma út á hvørjum ári framyvir.

Bókin í ár er longri enn bókin, sum kom út í fjør. Hesuferð telur hon 132 blaðsíður.

– Vit hava vaksið um hana, tí tað var neyðugt. Vit hava tikið ymiskt nýtt við, so tørvur var á meira plássi. Fleiri nýggir tættir og yvirlit eru við hesuferð, greiðir Eyðun Klakstein frá.

Eyðun sigur, at onkur spurdi um man ikki átti at givið eina tílíka bók út annað hvørt ár, tí Prix Føroyar bara er annað hvørt ár.

– Bókin í ár, at tónleikur í Føroyum er nógv meira enn Prix Føroyar. Sjálvandi, Prix Føroyar fyllir nógv teir mánaðirnar tað er, men tað er so nógv annað. Í ár hava til dømis nógvir bólkar verið uttanlands – nógv fleiri enn vanligt, og tað sæst eisini aftur í bókini.

Bókin inniheldur eisini nógvar myndir, sum ongantíð eru sæddar fyrr. Myndir frá bólkunum, tá teir hava verið uttanlands. Sum dømi kunnu nevnast myndir við Teiti Lassen í upptøkuhølum í Spania, Shalder í Argentina, umframt myndir úr Íslandi, Danmark, Noregi og so framvegis.

– Denturin er lagdur á popp og rokk tónleik, men annað hevur eisini fingið pláss í bókini. Tað er Studio Pegasus, sum gevur bókina út, sigur Eyðun, sum saman við Steintór Rasmussen hevur lagt bókina til rættis.

Bókin er bygd á greinar, sum hava staðið á pop.fo og í Sosialinum seinasta árið, men alt tilfarið er skrivað og redigerað av nýggjum. Eisini eru fleiri nýggjar greinar við. Ætlanin er framyvir, at víðka bókina, bæði, hvat viðvíkur síðutølum og tættum.

Tónleikur 2002 fæst nú til keyps í sølubúðunum, og kostar hon 159 krónur.



